Eli Hentze, fótbólts viðmerkjari í SvF:

# Speisemi kann bøta um spentar st

**Tað heldur Eli Hentze, sum fáorðaður nýtti orðafellið „onkuntíð má koma vatn í tómar brunnar", tá føroyingar herfyri spældu landsdyst á Svangaskarði. Hóast teir høvdu nógvar møguleikar, spurdist einki burtur úr, men kortini var sendingin bæði upplýsandi og undirhaldandi**

*Dagny Joensen*

Fyri tann óroynda, sum ikki hevur skil fyri fótbólti, men sum fegin setur seg framman fyri skíggjan, tá landsliðsdystir verða spældir, er tað torført at fylgja við, tá ofta verður í so nógv tosað yvir myndinar um spælið á vøllinum.

Áður kundi tú sløkkja fyri ljóðinum í sjónvarpinum og tendra útvarpið, har frásøgufólkið á øðrvísi hátt greiddi frá hvat fór fram á vøllinum. Um tú hevur televarp, ber tað ikki til longur, av tí at ljóð og mynd ikki fylgjast.

Herfyri var landsdystur á Svangaskarði, har Høgni í Jákupstovu var sjónvarpsvertur og aftrat sær hevði Eli Hentze, fótbóltsspælara og lærara, sum gjørdi viðmerkingar. Teir báðir riggaðu frálíka væl saman. Serliga av tí at Eli Hentze við sínum hóvligu og oftani stuttligu viðmerkingum, gjørdi dystin sera undirhaldandi, hóast úrslitið einki var at reypa av.

Eli Hentze er lærari í barnaskúlanum á Sandi. Hann er 36 ára gamal og hevur spælt fótbólt síðani hann dugdi at ganga. Honum dámar sera væl fótbólt, men veit ikki hvar hesin ovuráhugi stavar.

Eitt nú tekur hann allar fótbóltsdystir, sum verða vístir her og aðrastaðni, upp á sjónband, og hevur helst størstu sjónbandagoymslu í Føroyum, sum telur eini 300 bond.

## Kennir leiklutin hjá spælararunum

Umframt tað er hann kendur fótbóltsspælari í B71, og hevur verið við til at vinna felagnum nógvar sigrar. Í 1989 gjørdust teir føroyameistarar, steypavinnarar í 1993, Europa cub í 1994 og 96. Við øðrum orðum veit hann hvat rørist í leikararunum á vøllinum, tá hann ger viðmerkingar í sjónvarpinum.

Um sínar fyrstu royndir at vera viðmerkjari í sjónvarpinum, sigur Eli Hentze, at hann royndi hetta á fyrsta sinni í 1997, tá fótbóltsdystur var á Svangaskarði.

- Høgni Hoydal var sjónvarpsvertur, men tá var so nógvur mjørki, at vit sóu hvørki eitt ella annað. Nærstu ferðina eg var viðmerkjari var í Skotlandi í 2002, men tá gekst heldur ikki væl í hond, av tí at tekniska útgerðin als ikki riggaði. Tá vóru vit rættiliga sperdir, sigur Eli.

- Hvussu fyrireikar tú teg til hesa uppgávu?

- Fyri tað fyrsta skal eg hava góðar stundir at fyrireika meg. Eg hyggi eftir dystum á sjónbondum, sum mótspælarnir hava spælt og leiti fram allar upplýsingar



*Eli Hentze brosar tá sagt verður at hann er hóvligur. - Tað høvdu tey ikki sagt, sum kenna meg sum fótbóltsleikara. Hann kennir støðuna hjá leikararum á vøllinum, tá hann ger viðmerkingar til fótbóltsdystir í SvF*

um fólkið og viðurskiftini í landinum, har teir skulu spæla o.s.fr..

- Tað verður gjørt fyri at fata bakgrundina hjá teimum, sum vit skulu dystast ímóti. Stórur munur er á fólksløgum og lyndi í ymsu londum. Tað er eitt nú lættari hjá føroyingum at spæla móti norðmonnum enn fraklendinum, av tí at vit kenna betur viðurskiftini í Noregi. Eg brúki nógvar tímar at seta meg inn í hesi viðurskifti, sigur Eli Hentze.

## Fáorðaður viðmerkjari

Um hvussu er tað at vera viðmerkjari, tá tað gongur illa í hond, sigur Eli Hentze, at tað velst um tíð og stað. Tá teir í landsdystinum á Svangaskarði herfyri fingu ein góðan málmøguleika sum miseydnaðist, segði Eli fáorðaður, at bólturin helst endaði í Runavík.

- Tað er ilt at siga, men eg haldi, at ein øðrvísi máti at siga tað, lættir um spenningin og kanska eisini fyri,

## KROSSORÐ




Loysunarorðið: ..........................................

430

Navn: ...........................................................

Bústaður: ...................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá **BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:**

- ☐ **Okkara kokkur** - *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** - *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** - *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá **FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:**

- ☐ **Villini súgdjór** - *Dorethe Bloch/Edward Fuglø*
- ☐ **Føroysk Flora** - *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** - *Bogi Hansen*
- ☐ **Íslandsklokkan** - *Halldór Laxness*
- ☐ **Grót og steinar** - *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***